# 830 íbúðir ávegis í høvuðsstaðnum



*Millum Horna er virksemi øgiligt og fyrstu íbúðarbygningarnir eru longu reistir. 96 av teimum 830 íbúðunum sum eru ávegis í Havnini, koma at liggja har*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Bíðilistin eftir onkrum at búgva í í høvuðsstaðnum er langur. 1700 fólk standa á listanum, sum bara veksur. Men tilsamans 830 íbúðir eru ávegis í Havnini, so okkurt er sum røkist fyri, at bíðilistin í hvussu so er steðgar**

BÚSTAÐUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Ein skjót samanteljing av øllum teimum íbúðarverkætlanum, sum eru í Havnini sigur, at tað eru heili 830 íbúðir ávegis í økinum. Tá eru bæði "Stóratjørn" og "Undir Kongavarða" taldar við, sum eru tær báðar stóru verkætlanirnar.

Ætlanin í Stórutjørnverkætlanini er millum annað at fáa 300 nýggjar íbúðir. Her verður hugsað bæði um randarhús, lægri lonir og háhús. Hin stóra verkætlanin er tann, sum byrjað varð í gjár undir Kongavarða á Argjum. Her skulu tilsamans 276 íbúðir standa í 2012. Eisini her er talan um íbúðarblokkar og raðhús.

### 24 íbúðir aftrat millum Horna

Ein onnur stór verkætlan er tann millum Horna. Uppruna ætlanin segði at 72 íbúðir skuldu byggjast har, men hetta talið er økt við 24, soleiðis at tað nú skulu byggjast 96 íbúðir har.

Blómubrekka var ein verkætlan, sum hevur verið í gongd í eina tíð. Har skulu 39 íbúðir gerast tilsamans. 14 teirra eru lidnar og hinar 25 vera lidnar næsta mánað.

Á Boganeshamri skulu 32 íbúðir byggjast. Í miðbýnum har sum Frants Restorff áður var, skulu 31 íbúðir gerast. Í gamla snikkaravirkinum í Grønlandi skulu 10 íbúðir gerast, og í Varagøtu koma seks íbúðir aftrat.

### 40 aðrar íbúðir ávegis

Harnæst er ein onnur verkætlan ávegis, har 40 íbúðir skulu byggjast onkrastaðni í høvuðsstaðnum. Hetta upplýsir arkitekturin Magnus Hansen fyri Sosialinum. Hann er maðurin handan íbúðarverkætlanirnar hjá Havgrími Johansen – tað vil siga verkætlanirnar í Varagøtu, í snikkaravirkinum í Grønlandi og hjá Frants Restorff.

Magnus Hansen fær í løtuni onki sagt um, hvar hesar 40 íbúðirnar koma at liggja, men møguliga verður meiri at frætta um hetta seinni í vikuni.



*Soleiðis sær modellið av raðhúsum og íbúðarblokkum undir Kongavarða á Argjum út. Her fara tilsamans 276 íbúðir at liggja*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## FAKTA

Stóru íbúðarverkætlanirnar sum er í gongd í Havn:

| | |
|---|---|
| »Undir Kongavarða« | 276 íbúðir |
| »Á Boganeshamri« | 32 íbúðir |
| »Millum Horna« | 96 íbúðir |
| »Frants Restorff« | 31 íbúðir |
| »Snikkaravirkið í Grønlandi« | 10 íbúðir |
| »Stóratjørn« | 300 íbúðir |
| »Blómubrekka« | 39 íbúðir |
| »Varagøta« | 6 íbúður |
| Aftrat hesum koma | 40 íbúðir |
| Tilsamans eru | 830 íbúðir ávegis |

## Húsameklarin niðurringdur av áhugaðum fólki

**Jónsvein Mortensen, stjóri í húsameklarafelagnum Inni, sum stendur fyri søluni at íbúðunum undir Kongavarða sigur seg vera niðurringdan av fólki, ið ynskja at keypa onkra av íbúðunum, sum Valbjørn Dalsgarð letur byggja**

BÚSTAÐUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Á tíðindafundinum í Eik Banka í gjár um verkætlanina undir Kongavarða, gjørdi formaðurin í byggi- og býarskipanarnevndini greitt, at íbúðirnar verða seldar eftir bíðilistanum hjá kommununi. Tað hevði kommunan sett sum treyt, fyri at byggiharrin Valbjørn Dalsgarð kundi fáa lendið. Men tá bíðilistin telur 1647 fólk, fer neyvan at standa á at sleppa av við hesar.

Tað einasta, sum kann gerast ein trupulleiki, er sølan av marglætis íbúðunum, sum kosta 4,5 milliónir krónur og eru slakar 200 fermetrar til støddar. Tað segði Jónsvein Mortensen við Útvarpið í gjárkvøldi, sum er niðurringdur av áhugaðum keyparum.

– Tað verður ongin trupulleiki at sleppa av við bíligu íbúðirnar, men tær dýrastu vera ikki eins léttar at avseta, segði stjórin í Inni við Útvarpið.

Jónsvein Mortensen vísti eisini á, at nakrar av íbúðunum helst høvdu verið seldar dýrari undir fríari kapping, um prísurin ikki var fastlagdur. Hann metti, at minsta íbúðin uppá 43 fermetrar, helst hevði verið seld fyri eitt stað í millum 800.000 og 900.000 krónur, heldur enn tær 600.000 krónurnar, sum fastlagdi prísurin er settur at vera.